# Bót fyri at selja 12 fiskar

12 reyðsprøkur var fongurin, tá ein 70 ára gamal maður í danska býnum Helsingør setti eitt garn herfyri. Tá hann kom aftur at landi, komu tvær kvinnur oman á bryggjuna og vildu keypa tær 12 reyðsprøkurnar fyri 150 krónur. Maðurin tók av, men tað skuldi hann ongantíð havt gjørt. Ein embætismaður hjá fiskiveiðieftirlitinum sá tilburðin og meldaði tann gamla mannin, tí hann hevði ikki loyvi at selja fongin. Í síðstu viku bleiv tann 70 ára gamli dømdur at rinda 2.500 krónur í bót og eitt árs veiðibann. Helsingør Dagblad skrivar, at málið hevur vakt stóran ans, og at sjálvt ákærin vildi ikki trúgva sínum egnu eygum, tá hann fekk ákæruritið.



# Umrøða eykaskatt

Tað er ikki óhugsandi, at íslendingar við ríniliga góðari inntøku sleppa at rinda eykaskatt. Teir seinastu dagarnar hevur stjórnin í Reykjavík tingast um tillagingar í verandi fíggjarlóg, og Steingrímur J. Sigfússon, fíggjarmálaráðharri, váttaði fyri sjónvarpinum fyrrakvøldið, at eykaskattur er eitt evni, sum verður umrøtt. Hann nevndi einki tal, men sambært sjónvarpinum er ætlanin at leggja átta prosent eykaskatt á tey, sum forvinna meiri enn einar 35.000 danskar krónur um mánaðin. Sambært fjølmiðlunum viðger stjórnin ymisk tiltøk, sum skulu økja inntøkurnar hjá ríkiskassanum tey næstu trý árini, og væntandi verður vøgerðin í stjórnini liðug í hesari vikuni.

# Rúgvurok á sandinum á Sandi

Sunnunáttina var stórur bardagi á sandinum á Sandi. Ein maður fekk tvær tenn bukaðar úr munninum, meðan tvær aðrar fingu skaða.

Boð komu fleiri ferðir til løgregluna um rúgvurok, har ein hópur av fólki vóru farin til hendurs á sandinum á Sandi.

Løgreglan var skjót á staðnum og fekk skilt partarnar sundur, tá fyrsta fráboðanin kom umleið klokkan 2. Men friður var ikki longri enn eitt vist, tí longu klokkan 5 sunnumorgunin komu aftur boð um at nógv fólk vóru farin til hendurs.

Í sama viðfangi vóru nakrir bilar skøvaðir. Helst verður harðskapsmál burtur úr hendingin við manninum, sum misti tenn.

Hinvegin var rættiliga friðarligt á Skála.

- Har hava tey skikkað sær væl, staðfestir løgreglan.

## Innbrot í KFUM og K

Klokkan 20 fríggjakvøldið varð boðað frá, at innbrot hevði verið í KFUM og K í Klaksvík.

Tað er ilt at siga, hvussu viðkomandi er komin inn, men tað hevur verið innbrot á tríggjar skrivstovur. Ein lítil pengakassi varð tikin og onkur bússa. So talan var um lítlar upphæddir, ið eru stolnar.

Løgreglan veit ikki um annað er stolið. Mann veit ikki rættiliga, hvør hevur gjørt tað. Ongin er handtikin í málinum.

Hetta var ikki einasta innbrotið í Klaksvík, tí innbrot var eisini í skúlanum við Ósánna um vikuskiftið.

*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu*

## Løg-reglan fekk vápn

Seinastu mánaðirnar hevur danska løgreglan givið fólki loyvi til at vera dulnevnd, um tey hava latið ólóglig vápn til løgregluna.

Hetta hevur ein føroyingur gjørt sær dælt av, og lat í gjár eina salongriflu til løg-regluna.

- Tá tað ber til í Danmark, so ber eisini til her, staðfestir vakthavandi, og greiðir frá, at seinast vápn vórðu latin á henda hátt, var fyri nøkrum árum síðan, eftir vanlukku-ligu skothendingina í Leirvík.

## Datt av í bilinum

Ein maður í hálvtrýssjunum koyrdi fullur klokkan 16 fríggjadagin.

Tá løgreglan kom fram á hann, lá maðurin og svav í bilinum. Maðurin var á Glyvrum og hann hevur verið so dýrandi fullur, at fólk høvdu boðað frá, at hann nóg illa fekk stýrt bilinum.

Maðurin missir helst koyrikortið, og so avgerð promillan, um hann sleppur at ganga leysur ella sleppur ein túr handan rimar.

## Ófriður í Havnardali

Tað er eftir hondini ein afturvendandi trupulleiki hjá løgregluna, at motorkrossir og fýrahjólaðar motorsúkklur koyra úti í Havnardali.

Av tí, at koyringin fer fram so langt burturi frá vegnum, fær løgreglan ikki gjørt so nógv, men hesi ljóðini órógva hestarnar í dalin-um øgiliga nógv, og kann gera skaða á børn og ross í økinum.

## Ferðslu-kanningar eisini hesa vikuna

Seinastu vikuna hava ferðslukanningar verið, og tað verða bilur og førari, ið verða kannað. Dekk, ljós, ferð, koyrikort og skilið á førara.

Eitt parkeringsljós og nummarplátuljós geva ikki so nógv, meðan lykt-ir og píkadekk kosta eitt sindur.

Kanningar verða gjørdar alla hesa vikuna eisini, so tað er at syrgja fyri at vera í eins góðum standi sum altíð.

## Gloymdu eingangsgrill á platti

Klokkan 11 sunnumorgunin varð boðað frá eldi við eini hús við Eystara Ringveg. Eldurin var kyknaður, tí persónarnir, ið helst ætlaðu sær at grilla um morgunin, vóru sovnaðir.

So eingangsgrillirnar, sum vóru settar á ein platt, høvdu fest í plattin, og vandi var fyri, at eldur kom í húsini.

Sløkkiliðið kom á staðið og fekk sløkt eldin.

# Omanlop á Víkarvegnum

**Umleið 60 tons av gróti komu oman á landsvegin, tá ið tað leyp úr einum hamara sunnanfyri Fossá. Staðið, har tað leyp veður nú kanna nærri**

Tað var um hálvgunn 6-tíðina í gjárkvøldið, at Landsverk fekk boð um, at grót var komið oman á vegin millum Langasand og Haldórsvík, so at tað ikki var koyrandi millum bygdirnar. Fólk frá Landsverki komu á staðið stutt eftir, og tey kundu staðfesta at umleið 60 tons av grótið vóru komin oman á landsvegin einar 100 metrar sunnanfyri brúnna um Fossá. Nógvir stórir steinar vóru í grótrúgvuni, og vigaði tann tyngsti umleið 18 tons.

Landsverk fekk skjótt rudda so mikið av grótinum burtur, at ferðslan slapp ígjøgnum. Um 9-tíðina í gjárkvøldið vóru teir lidnir at rudda.

Staðfest er, at grótið, sum kom oman á vegin í gjárkvøldið er lopið úr einum hamara einar hálvthundrað metrar oman fyri landsvegin. Fólk frá Landsverki fara nú at kanna staðið har tað leyp nærri fyri at vita, um nakað kann gerast fyri at tryggja staðið.

Sambært fólkum, sum hava arbeitt á Landsverki í mong ár, er tað sera óvanligt at so stórt grót kemur oman á landsvegin. Grótið var somikið stórt, at eitt trygdarhegn, eins og tað, sum er sett upp á Tjørnuvíkarvegnum hevði neyvan lofta omanlopinum.



*Kelda: Landsverk*